# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Martin Tórgarð 80



Týsdagin 1. mars fylti Martin Tórgarð í Havn 80 ár. Mamman var Valborg Eide úr Nólsoy, hon doyði í 1927 á barsilssong við yngsta soninum Hansemann. Pápin var tann vælkendi H.C.W. Tórgarð, arkitektur, politikari og mangt annað. Hann doyði í 1957.

Tey bæði Valborg og Tórgarð - sum hann vanliga varð nevndur - fingu sjey børn: Jens, sum býr í Danmark. Elinborg. Anna. Tvíburarnir Axel og Poul. Martin. Hans, kallaður Hansemann. Elinborg, Poul og Hansemann eru deyð.

Tá Valborg doyði í góðum árum, vórðu fleiri av børnunum sett út. Fýra teirra - Jens, Elinborg, Anna og Axel - vórðu verandi í Havn hjá pápanum. Poul vaks upp hjá mostrini Mariu Eide, sum var lærarinda í Funningi. Martin vaks upp hjá einari aðrari mostur. Tað var Anna, kallað Angan. Hon var gift úti í Nólsoy við Sigmundi í Geil. Tann yngsti, Hansemann, vaks upp í Havn hjá fastrini, kallað Bebban og gift við Mariusi Rein.

Martin hevur siglt sum skipari og stýrimaður, m.a. sigldi hann við Fame. Miðskeiðis í fimtiárunum fór hann at føra læknabátin Reyða Kross og var skipari á honum í mong ár, til hann legði frá sær fyri aldur.

Fleiri av Tórgarðsbrøðrunum hava verið og eru tiltiknir góðir kvøðarar, og Martin smæðist ikki burtur ímillum í so máta. Tað hevur ikki drigið frá, at hann vaks upp hjá kvæða-kempuni Sigmundi í Geil í Nólsoy. Martin er kendur í øllum dansifeløgum í landinum. Umframt at kvøða, hevur hann eisini sungið inn á band til Útvarpið.

Martin er giftur við Signhild úr Nólsoy. Børn: Helgi, sum datt oman og doyði norðuri við Gjógv í 1992. Valborg, sum doyði smágenta. Fritjof, sum býr í Hirtshals. Tóra. Anna.

Martin, sum mong munna kenna frá skemtitekningunum á baksíðuni í Dimmalætting.

Trý tey seinast nevndu búgva øll í Havn.

Signhild og Martin eiga 8 ommu- og abbabørn og 2 langommu- og langabbabørn.

Hóast 80 ára gamal er Martin framvegis birgur og er javnan at síggja í havnargøtum.

Honum verður ynskt hjartaliga tillukku.

## Dagurin

**8. mars. Beata.** Er ikki at finna í halgimannatali. Navnið merkir *hin sæla* ella *hin eydnuríka.*

## Tøkk

Øllum tykkum, sum gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum 29. januar 2005, takka vit hjartaliga.

Ein serstøk tøkk til børn, svigarbørn og barnabørn, sum hjálptu okkum so væl henda merkisdag. Somuleiðis tøkk til vinir og kenningar, tykkum sum spældu, yrktu og ikki at gloyma tykkum, sum sungu henda vakra morgunin heima hjá okkum.

Eisini takka vit øllum, sum við gávum, fjarritum og á annan hátt gleddu okkum.

Ein hjartans tøkk øll tit, ið hjálptu til, at dagurin eydnaðist so væl.

**Amanda og Leivur**

## Minningarorð um okkara góða pápabeiggja og abbabeiggja,

# Sofus Eide, Nólsoy

**Føddur 27.10.1949 Deyður 13.01.2005**



Tung vóru boðini, tá vit fingu at vita, at tú ikki var millum okkum meira. Hetta var, hóast heilsan var farin at bila, rættuliga brádliga. Tosaðu við teg stutt áðrenn og tað var sum vanligt at hoyra "eg havi tað gott". Lagið var so gott, tá ið vit ígjøgnum telefon kundi práta um mangt og hvat, serliga veðrið í Nólsoyarfirið, sum tú lærdi okkum so nógv um, ofta ringdu vit til tín og vildi vita um streymin á fjørðinum og ættina, og tú var altíð klárur at svara okkum.

Vit minnast eisini tá vit vórðu smágentur, tá tú kom aftur av skipi, altíð hevði tú okkurt við til okkum, dukkur, blýantar, bomm o.m.a.

Áðrenn jól tá vit tosaðu saman, vildi tú so gjarna hava okkum út til Nólsoyar á jólum, tú dámdi so sera væl at fáa Napolion og Róa eysturum at hyggja eftur fótbólti saman við tær, mangan ringdi tú og vildi hava parabolina stillaða. Altíð blíður og í góðum lag, tá vit vóru komin út. Tá tú kom norður um at fáa tær drekkamun, hugdi tú inn um hurðina og segði: "nú hvussu var veðrið", smílandi, visti sum var at okkurt rull hevði nokk verið. Onkrantíð høvdu vit keypt tær klæðir út við og tá var tú so glaður, eisini tá fartelefonin kom út, hon var mangan góð at hava hjá tær. Børnini vóru altíð glað at síggja abbaba, tú dámdi so væl at sita á bonkinum í køkinum og spæla við tey. Tá vit ikki vóru har úti so ringdi tú og spurgdi hvussu gekst við teimum, glaður var tú tá tú fekk at vita at tey høvdu tað gott. Vit minnast hvussu glaður tú var tá beiggin enduliga kom, tá tit flettu í heyst var beiggin og hugdi at og tú og babba tóku seyðirnar út fyri at vísa honum og lata hann sleppa at nerta við teir, tit fingu ikki meir enn 13 mánaðir saman, men tú upplivdi so at hoyra hann siga abbaba.

Mong eru minnini um tað tíð vit høvdu saman. Hugsaðu ikki at vit fyri síðstu ferð skuldu vinka bei bei til tín, tá ið vit fóru inn aftur áðrenn nýggjar. Bankaði uppá køksrútin hjá tær og tú kom út í køkin og vinkaði …..

Saknurin er stórur, eingin telefonuppringing frá tær, og ikki um at tala, nú tá vit koma útaftur og tú ikki er har. Men hjá tykkum babba og mamma, man hann verða enn størri, tí nú eru tit púra einsamøll. Tit vórðu góð við hann og tóku tykkum væl av honum, og tá omma doyði bleiv hann næstan sum ein sonur hjá tykkum.

Má harrin styrkja okkum øll í hesi stóru sorg, og leggja vit alt í Harrans hond.

Friður veri yvir minnið um okkara góða pápabeiggja og abbabeiggja Sofus Ejde

**Sólbjørg, Elisabeth og Heinina v/ familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður mín

**Vilhelm Hansen**
**(Ville)**
**Nes**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prest fyri troystarík orð, bæði í heimi og kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til Vesturskin.
Tøkk til berarar, sangarar, kirkjutænarar, tykkum, sum hjálptu til við ervinum og øllum tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig tøkk vil eg veita tykkum í heimarøktini, sum vóru um hann til tað seinasta.

*Bestu heilsanir*
**Sára**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu, tá elskaði maður og pápi okkara

**Freilif Petersen**

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri alla hjálp og stuðul.

**Kona og synir**